# Fiskimálaráðið
SKIPAEFTIRLITIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

# Skipaeftirlitisfólk

## Skipaeftirlitið søkir eftir einum skipaeftirlitsfólki

Starvið er í høvuðsheitum skrivstovuarbeiðið/málsviðgerð og inniber m.a. hesar upppgávur:

- Umsiting og eftirlit við undirveitarum
- klassaeftirlit
- málsviðgerð og uppfylging av sýnum
- luttaka í tvørgangandi uppgávum á Skipaeftirlitinum, undir hesum verkætlanum

**Førleikakrøv:**

- Til starvið krevst viðkomandi útbúgving sum t.d.:
- skipsverkfrøðingur
- verkfrøðingur sum er serkønur innan sjóvinnu
- maskinmeistari við víðkaðum maskinmeistaraprógvi og sjóvinnubrævi sum skipsmaskinstjóri, STCW III/2
- góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli

Ynskiligt er, at umsøkjarin hevur starvsroyndir.

Fyrimunur er, um umsøkjari hevur kunnleika til góðskustýring (kvalitetsstýring), ISM og ISPS.

Í starvinum er møguleiki at fáa eftirútbúgving innan viðkomandi arbeiðsøki.

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Skipaeftirlitið í Miðvági.

Tann, ið settur verður, má tí kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Skipaeftirlitinum í hendi í seinasta lagi 1. februar 2006, kl. 14.30.

Umsóknir skulu sendast til:

**Skipaeftirlitið, Postsmoga 26, 370 Miðvágur**

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Skipaeftirlitið á tlf. 355600 og tosa við Óla Hans Hammer Olsen, deildarstjóra.


Country Buffét
mánadag - fríggjadag frá kl. 11.30 (- 14.00)

Menu
m.a.
Country suppa
Eksotiskur, heitur pastarættur
Spare Ribs
Buffalo chicken wings
Innbakaðar "china prawns" (rækjur)
Innbakaður "Calamari" (høgguslokkur)
Rio Bravo Roast "marinerað oksafilet"
"Husets sorte gryde"
"Fish special"
Dagsins rís
Stokt epli
Kryddað og súr-søt sós
Stór salatbar
Frísk frukt og vanilliecreme
o.a.
kr. 69,-
Take away kr. 55,- (fyll bakkan)

Matur út úr húsinum: Um tú hevur eitt borðhald at fyriskipa, so hava vit bæði matin og serveringina!
Vit kunnu skipa fyri øllum úr 8 - 1000 kuvertar!







Lunch Steak
við salati, bakaðum epli og persillusmøri ella bernaisesauce

Vel eina støðd:
150 gr. 52,-
200 gr. 68,-
250 gr. 85,-
300 gr. 98,-

TEAM85

RIO BRAVO RESTAURANT
· Beef & Steak House ·
Tórsgøta 11 · Tórshavn · Tel 31 97 67 · www.riobravo.fo




www. Sosialurin .fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 4131**
**Navn:** Sp/f MJ Holding
**Adressa:** Skemmingsgøta 24 100 Tórshavn
**Kommuna:** Tórshavnar
**Stovningardato:** 04-01-2006
**Viðtøkudato:** 04-01-2006
**Stovnarar:**
Magni Johannesen, Skemmingsgøta 24, 100 Tórshavn
**Stjórn:**
Magni Johannesen, Skemmingsgøta 24, 100 Tórshavn, (stjóri)
**Grannskoðari:**
Sp/f SPEKT, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn
**Partapeningur:**
kr. 100.000,00
**Inngjaldingarháttur:**
Kr. 100.000,00 í ørðum virðum til kurs 100.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum.
**Endamál:** Endamál felagsins er at eiga partabrøv, smápartabrøv og virðisbrøv annars.
**Roknskaparár:**
01.01 - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:**
04.01.2006 - 31.12.2006

*Skráseting Føroya*
*tann 09. januar 2006*

*Kristin Balle*

## Heimarøktin - Vágoy/Norðstreymoy

# Korndalsbýlið á Eiði

Søkt verður eftir fólki at arbeiða í náttarvakt á Korndalsbýlinum á Eiði at byrja 1. februar 2006 ella skjótast tilber.

Ynskiligt er at viðkomandi hevur útbúgving sum heilsuhjálpari ella aðra viðkomandi útbúgving, eins og neyðugt er at hava royndir innan eldrarøkt.

Starvið verður lønt eftir sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Kristbjørg Toftegaard, varðaleiðara tlf. 422570/214570.

Skrivlig umsókn verður at senda til :

**Heimarøktin Vágoy/Norðstreymoy**
Økisskrivstovan
Heilsumiðstøðin
370 Miðvágur

Sosialurin
www.sosialurin.fo